# Tinghellan

# Valdið fylgir ikki valinum





**Nú er ikki meir enn ein vika eftir til valið, og mangir valstríðshugaðir føroyingar leggja árar í sjógv at vinna spurtin móti politiska málinum. Kári á Rógvi hugleiðir á Tinghelluni í dag og í morgin um, hvat bíðar vinnarunum, tá ið valið er av.**

Næstan hálvt triðja hundrað fólk eru uppstillaði til løgtingsvalið. Tey, ið ikki verða vald, kunnu gleða seg til at sleppa aftur í sítt dagliga yrki, men samstundis til at sleppa í onkra almenna nevnd ella verða boðin til onkran almennan døgurða, tá høvið býðst. Summi teirra kunnu enntá vænta at sleppa inn á ting sum varafólk okkurt styttri skifti.

Fyri tey 32, ið verða vald, er søgan ein heilt onnur. Niðanfyri er ein lítil brúkaravegleiðing frá okkum á Tinghelluni, serliga ætlað nýggjum tingmonnum.

### Ein dagur í tinginum

Hjá teimum flestu valdu tingfólkunum verður tingmannalønin ov lág, og politiska framtíðin so mikið ivasom, at tey fáa ikki sagt borgarliga starv sítt frá sær. Arbeiðsdagurin verður tí av sær sjálvum rættuliga trupul.

Tingformaðurin kann verða ein heldur forsmáddur eldri politikari úr tapandi partinum í innanhýsis maktstríði í egna flokki sínum. Hesin fer kanska at brúka valdið sum tingformaður at vinna sær tann síðsta maktrúsin, áðrenn hann helst ríkur út eftir næsta val. Tí skalt tú vænta, at arbeiðsskráin hjá tinginum ikki verður kunngjørd fyrr enn kl. 15.00 dagin fyri næsta tingfundin. Tá er vanliga ov seint at biða fólk taka eina vakt ella nakrar tímar fyri seg. Hevur tú avrátt nakað við børnini ella makan, má tað eisini flytast.

Meginparturin av tíðini hjá tær fer til at sita og lurta. Lurta eftir illa fyrireikaðum røðum, sum tingfólk halda fyri hvørjum øðrum, tí uppskotini frá landstýrinum koma so seint, at tit náa ikki at fyrireika tykkum nóg væl. Ongin tingmaður torir heldur at lata vera við at sita í salinum, tí heimasíðan hjá tinginum — og miðlarnir — halda eyga við, um tú ert í salinum. At tað fyri tað mesta ikki er til nakra verðsins nyttu, hevur sum so onki við sakina at gera.

Tá tú ert á veg heim eftir tingfundin byrjar tann strævnasti parturin av degnum. Veljarnir eru so umhugsnir at ringja til tín, hvørja ferð teir eru ónøgdir við okkurt. Tá tú hevur tosað við teir og fingið tær eina breyðflís, er tíðin komin at fara til føðingardagar, fundir, møti ella annað, ið skal vísa veljarunum, at tú ikki hevur gloymt teir, nú tú ert vorðin ein av teimum fínu í Havn. Tá tingfundur ikki er, eru tað ivaleyst av konfirmatiónum, brúdleypum og ársdøgum til tess, at tú ført stytt tær stundir. Fyri slett ikki at koma inn á jarðarferðirnar. Tær eru sera týðandi fyri tingfólk og mugu undir ongum umstøðum gloymast.

### Arbeiðsumhvørvið

Tað politiska landið Føroyar byggir sjálvsagt á tey mentunarligu virðir, sum føroyska tjóðin hevur vart allar hesar mongu øldirnar. Ein tann fremsti tjóðareginleikin, pátikið lítilætni, er heldur ikki gingið tinginum forbí. Sjálvt um løgtingið beinleiðis ella óbeinleiðis ræður yvir útreiðslum fyri einar fimm milliardir um árið, brúka vit færri enn 50 milliónir uppá løgtingið sjálvt. Hetta merkir, at føroyska politiska skipanin er sum ein dynosaurur — høvdið er so lítið, at kroppurin nærum livir sítt egna lív. Tær fáu heilakyknurnar — tú og hini 31 — hava ikki orku til nógv annað enn at siga ja og nei, tá ymsu limirnir og gøgnini hjá dynosaurinum spyrja um hetta og hatta.

Tú mást rokna við at brúka nógva tíð at kopiera, leita fram tilfar, streva teg ígjøgnum fakligt tilfar uttanfyri títt egna fakøki, skriva røður, álit og broytingaruppskot. Nú ert tú kanska von við fakfelagsarbeiði, kommunalt arbeiði ella arbeiði á almennu stovnunum. Tá hevur tú helst sæð, hvussu skilagott tað er at hava eitt vælskipað arbeiðsbýti í eini slíkari skipan, hvussu neyðugt tað er við fakligari ráðgeving, og hvussu týðandi eitt gott starvslið er, tá ætlanir skulu leggjast. Soleiðis er tað bara ikki í løgtinginum. Heldur skalt tú vænta tær at skula rógva á øllum bekkum sjálv.

### Politikkur uttanfyri tinggátt

Viðhvørt sleppur tú at møta onkrum stovnsleiðara. Tak til dømis stjóran og nevndarformannin á ALS. Tær siga, at ALS er – als – ikki ein almennur stovnur, so tær sleppa undan at greiða veljaranum frá, hvat og hví tær gera. Og sjálvt um stýrisskipanarlógin sigur, at bara fólkavalda tingið kann leggja skatt á fólkið og játta almennar pengar, so sleppa tær at skatta og brúka uttan at tú hevur nakað at siga.

Soleiðis eru so mangir stovnsleiðarar. Tær eru í meðal betri útbúnar enn tú. Teir eru tryggjaðir at vera í starvi til pensjónsaldur fyri eina betri løn enn tína. Tey kunnu siga við miðlarnar, at 'tey kunnu ikki úttala seg um málið í løtuni, men tey arbeiða við fleiri ymsum loysnum'. Tá avtornar eru tað hesi saman við seráhugafeløgunum, ið skriva tey álitini, tú skalt samtykkja. Gert tú ikki tað, missir tú undirtøku hjá hesum bólkum, ført ábreiðslur frá miðlunum, og tú hevur jú ikki umstøður at skriva nakað haldgott álit sjálvur.

### Tað, ið val skal vera

Men, fyri at fara aftur til byrjanini. Hvat hendir, tá valúrslitið er greitt? Fyrst hendir tað, at umleið tríggjar ferðir so nógv fólk, sum í veruleikanum hava atkvøtt fyri tær, koma at fáa sær smyrjibreyð ella okkurt at smyrja hálsin við. Hetta leggur tú onki í. Tí breyðið er smurt, og tað er nógv verri at vera ein av teimum, sum skulu beina fyri smyrjibreyði dagin eftir valið.

Tá gleðin — ella timburmenninir — hava lagt seg, er tað umráðandi, at tú skilir, hvønn leiklut ein føroyskur tingmaður hevur. Tit eru í nakað somu støðu sum teir romerskt-katólsku kardinalarnir. Umframt at tit eru nógv virdir, men fáa lítla løn í mun til ábyrgdina, so sleppa tit at ganga í skrúðgongu og at velja okkara politiska páva — løgmann.

Romerski pávin situr til hann doyr. Løgmaður doyr politiskt minst fjórða hvørt ár. Fráfarandi tingformaðurin (tit minnast) sleppur nú at spæla seremonimeistara burturav. Við yngru stýrisskipanarlógini fingu vit eina skipan, ið neyvt líkist pávavalinum, burtursæð frá tí hvíta roykinum. Fráfarandi tingformaðurin kallar floksformenninar til sín og spyr teir, hvør skal sleppa at skipa samgongusamráðingarnar.

Tú ert sum limur í einum av tingflokkunum við til at gera av, hvønn tín floksformaður skal vísa á.

Hvussu leikur síðani fer, hyggja vit nærri at í morgin.



## Valdømini í søguni

Frá og við blaðnum í dag og inntil sjálvan valdagin fara vit at hava greinar í blaðnum, sum í tølum og orðum siga frá, hvussu flokkarnir hava staðið seg í teimum sjey valdømunum síðani 1966. Tað er Jóannes Hansen, samfelagsfrøðingur, sum seinastu nógvu árini hevur verið viðmerkjari í sjónvarpinum valkvøldini, ið hevur lagt til rættis.

Orsøkin til at vit lýsa valini síðani 1966 er, at tá var fyrsta valið, har bara persónligu atkvøðutølini gjørdu av, hvør skuldi á ting. Frammanundan høvdu tey, sum vóru ovast á listanum, fingið hjálp frá listaatkvøðunum.

Umframt samlaða atkvøðutalið hjá flokkunum er eisini persónliga atkvøðutalið skrivað hjá teimum, ið hava verið vald á ting síðani 1966.

NORÐOYA VALDØMI:

# Tríggir hava átt umboðan hvørja ferð

**Hákun Djurhuus eigur persónliga atkvøðumetið, sum hann setti í 1966. Fólkaflokkurin hevur leingi verið størstur, men áður hava bæði javnaðarflokkurin og tjóðveldisflokkurin átt henda lutin**

Norðoyingar hava ikki verið teir, sum títtast hava skift flokkarnar út, sum hava umboðað teir í tinginum, og tað er sjáldan komið fyri, at tingmaður, sum hevur stillað uppaftur, ikki hevur verið afturvaldur – um flokkurin hjá honum hevur vunnið umboðanina aftur.

Tjóðveldisflokkurin vann fyrstu ferð umboð í Norðoyggjum í 1954. Síðani tá hava Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin hvørja ferð átt umboð í valdøminum. Til og við valinum í 1974 átti Norðoya valdømi tveir umdømisvaldar tingmenn. Síðani 1978 hava teir verið fýra.

Fólkaflokkurin hevur verið størsti flokkur í Norðoyggjum mesta partin av tíðini. Stóra undantakið var í 1970. Tá var fólkafloksmaðurin eykavaldur. Einasta ferðin at Tjóðveldisflokkurin hevur verið størstur í Norðoya valdømi var í 1958. Í 1998 hevði Tjóðveldisflokkurin eitt so mikið gott val í Norðoyggjum, at teir møguleikan á komandi valinum at vinna tveir umdømisvaldar tingmenn at vera realistiskan.

### Tveir javnaðarmenn

Tær síðstu ferðirnar hevur Javnaðarflokkurin stríðst fyri at varðveita umboðanina í Norðoyggjum. Á síðsta vali megnaðu teir tað væl, men í 1994 restaðu bara seks atkvøður í hjá Sambandsflokkinum at fáa Javnaðarflokkin aftur.

Javnaðarflokkurin hevur verið betri fyri í Norðoyggjum, enn hann hevur verið seinastu ferðirnar. Best var hann fyri, tá Poul Jacob Olsen, sáli, var á tindinum. Í 1970 var hann størsti flokkur í valdøminum. Tá var hann so væl fyri, at hann hevði vunnið tveir umdømisvaldar sessir, um tað tá høvdu verið fýra og ikki tveir umdømisvaldir í valdøminum.

### Hákun toppskorari

Flestu persónligu atkvøðurnar á einum vali eigur í Norðoya valdømi Hákun Djurhuus, sáli. Eftir at hann hevði verið løgmaður í sjálvstýrislandsstýrinum 1963 – 1966 góvu 578 norðoyingar honum atkvøðuna. Næsthægsta talið er tað hjá Anfinni Kallsberg í 1990. Tá fekk hann 560 atkvøður.

Metið hjá Hákuni er merkisvert. Í 1966 vóru 2.526 norðoyingar á vali. Hægsta veljaratalið var í 1988. Tá atkvøddu 3.880 norðoyingar. Atkvøðutalið hesa ferð verður ivaleyst ikki so langt frá tí, sum tað var í 1988. Og tað skal nógv til hjá tí, sum droymir um at røkka lutfalsliga sama part av atkvøðunum, sum Hákun Djurhuus fekk í 1966.



*Flestu persónligu atkvøðurnar á einum vali eigur í Norðoya valdømi Hákun Djurhuus, sáli. Eftir at hann hevði verið løgmaður í sjálvstýrislandsstýrinum 1963 – 1966 góvu 578 norðoyingar honum atkvøðuna. Næsthægsta talið er tað hjá Anfinni Kallsberg í 1990. Tá fekk hann 560 atkvøður*

| | |
|---|---|
| **1966** | |
| Fólkaflokkurin | .696 |
| Hákun Djurhuus | .578 |
| Sambandsflokkurin | .267 |
| Javnaðarflokkurin | .644 |
| Poul Jacob Olsen | .386 |
| Sjálvstýrisflokkurin | .277 |
| Tjóðveldisflokkurin (eyka) | .560 |
| Finnbogi Isaksen | .243 |
| Framburðsflokkurin | .82 |
| | **2.526** |
| **1970** | |
| Fólkaflokkurin (eyka) | .634 |
| Hákun Djurhuus | .434 |
| Sambandsflokkurin | .252 |
| Javnaðarflokkurin | .779 |
| Poul Jacob Olsen | .373 |
| Sjálvstýrisflokkurin | .295 |
| Tjóðveldisflokkurin | .690 |
| Finnbogi Isaksen | .225 |
| Framburðsflokkurin | .- |
| | **2.650** |
| **1974** | |
| Fólkaflokkurin | .725 |
| Hákun Djurhuus | .436 |
| Sambandsflokkurin | .275 |
| Javnaðarflokkurin (eyka) | .717 |
| Poul Jacob Olsen | .353 |
| Sjálvstýrisflokkurin (eyka) | .436 |
| Asbjørn Joensen | .242 |
| Tjóðveldisflokkurin | .733 |
| Finnbogi Isaksen | .356 |
| Framburðsflokkurin | .16 |
| | **2.902** |
| **1978** | |
| Fólkaflokkurin | .690 |
| Hákun Djurhuus | .204 |
| Sambandsflokkurin (eyka) | .484 |
| Eli Nolsøe | .177 |
| Javnaðarflokkurin | .658 |
| Poul Jacob Olsen | .268 |
| Sjálvstýrisflokkurin | .503 |
| Asbjørn Joensen | .248 |
| Tjóðveldisflokkurin | .608 |
| Finnbogi Isaksen | .295 |
| Framburðs– og Fiskivinnuflokkurin | .255 |
| | **4390** |
| **1980** | |
| Fólkaflokkurin | .672 |
| Anfinn Kallsberg | .213 |
| Sambandsflokkurin (eyka) | .426 |
| Eli Nolsøe | .150 |
| Javnaðarflokkurin | .668 |
| Vilhelm Johannesen | .357 |
| Sjálvstýrisflokkurin | .460 |
| Asbjørn Joensen | .218 |
| Tjóðveldisflokkurin | .606 |
| Finnbogi Isaksen | .268 |
| Framburðs– og Fiskivinnuflokkurin | .389 |
| | **3.221** |
| **1984** | |
| Fólkaflokkurin | .850 |
| Anfinn Kallsberg | .374 |
| Sambandsflokkurin | .403 |
| Javnaðarflokkurin | .762 |
| Vilhelm Johannesen | .371 |
| Sjálvstýrisflokkurin | .480 |
| Asbjørn Joensen | .214 |
| Tjóðveldisflokkurin | .658 |
| Heini O. Heinesen | .173 |
| Kristiligi Fólkaflokkurin | .258 |
| | **3.411** |
| **1988** | |
| Fólkaflokkurin | .1.098 |
| Anfinn Kallsberg | .464 |
| Jógvan við Keldu | .442 |
| Sambandsflokkurin | .466 |
| Javnaðarflokkurin | .682 |
| Vilhelm Johannesen | .309 |
| Sjálvstýrisflokkurin | .460 |
| Tjóðveldisflokkurin | .680 |
| Heini O. Heinesen | .277 |
| Kristiligi Fólkaflokkurin (eyka) | .459 |
| Niels Pauli Danielsen | .349 |
| Framsóknarflokkurin | .35 |
| | **3.880** |
| **1990** | |
| Fólkaflokkurin | .1.137 |
| Anfinn Kallsberg | .560 |
| Sambandsflokkurin | .373 |
| Javnaðarflokkurin | .836 |
| Vilhelm Johannesen | .332 |
| Sjálvstýrisflokkurin (eyka) | .570 |
| Asbjørn Joensen | .290 |
| Tjóðveldisflokkurin | .611 |
| Heini O. Heinesen | .230 |
| Kristiligi Fólkaflokkurin (eyka) | .35 1 |
| Niels Pauli Danielsen | .175 |
| Sosialistiski Loysingarflokkurin | .- |
| | **3.878** |
| **1994** | |
| Fólkaflokkurin | .765 |
| Anfinn Kallsberg | .392 |
| Sambandsflokkurin | .426 |
| Javnaðarflokkurin | .434 |
| Vilhelm Johannesen | .141 |
| Sjálvstýrisflokkurin | .460 |
| Álvur Zachariasen | .126 |
| Tjóðveldisflokkurin | .702 |
| Heini O. Heinesen | .492 |
| Kristiligi Fólkaflokkurin | .403 |
| Miðflokkurin | .83 |
| Verkamannafylkingin | .94 |
| Føroyski flokkurin | .56 |
| Frælsisfylkingin | .59 |
| | **3.367** |
| **1998** | |
| Fólkaflokkurin | .1.047 |
| Anfinn Kallsberg | .511 |
| Jógvan við Keldu | .222 |
| Sambandsflokkurin | .275 |
| Javnaðarflokkurin | .647 |
| Vilhelm Johannesen | .268 |
| Sjálvstýrisflokkurin | .385 |
| Tjóðveldisflokkurin | .957 |
| Heini O. Heinesen | .514 |
| Kristiligi Fólkaflokkurin | .277 |
| Miðflokkurin | .62 |
| Verkamannafylkingin | .19 |
| | **3.669** |